

*Matarlepin á Rigolo*



*Jógvan Gregersen við salfiski, sum verður útfluttur til Italia, har eitt nú Rigolo matstovan brúkar fiskin*

# Vaðhorn uppkallað í Milano

MATSTOVAN **RIGOLO** Í MILANO HEVUR **SALTFISK** FRÁ **VAÐHORN** Á **MATARLEPANUM** – OG TAÐ **SÆST** AFTUR Á **MATARLEPANUM**




**FISKUR**

**Eyðun Klakstein**

eydun@sosialurin.fo


Á Vaðhorn á Strondum framleiða tey saltfisk, sum verður útfluttur til Suðureuropa – serliga Italia og Spania.

Út ímóti hundrað fólk arbeiða á Vaðhorn, har Jógvan Gregersen er stjóri og Jens Martin Kundsen virkisleiðari.

– Síðsta ár útfluttu vit umleið 2500 tons av fiski til Spania og góð 1500 tons til Italia, men tað skiftir eitt sindur, hvat av londunum keypir meira frá okkum, sigur Jógvan Gregersen.

Fiskurin frá Vaðhorn endar í handlum, á matstovum og aðrastaðni.

### Rigolo

Ein matstova, sum fær fisk frá Vaðhorn, er Rigolo, sum liggur í miðbýnum í Milano. Rigolo er ein hugnalig matstova við nógvum ári á baki, og har gera tey nógv burtur úr at bjóða sínum kundum góðan fisk.

Ein rættur á matarlepanum er »Baccalà Vadhorn alla Veneta con polenta«.

Hetta er saltfiskur, sum matstovan umvegis ein italskan umboðsmann fær frá Vaðhorn á Strondum, og á Rigolo eru tey sera fegin um føroyska fiskin.

